# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

26. juni fingu Siri og Herman Olsen, Porkeri, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4150 gr.

3. juli fingu Joan Jacobsen og Magni Jacobsen, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4200 gr.

7. juli fingu Ragnhild og Hallur Knudsen, Saltangará, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4080 gr.

7. juli fingu Evi og Jógvan í Skorini, Eiði, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4150 gr.

7. juli fingu Beinta W. og Brian Fossabrúgv, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4620 gr.

8. juli fingu Vivian Olsen og Johannes Johannesen, Argir, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 2910 gr.

9. juli fingu Guðrið og Jonhard Jóanesarson, Saltangará, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

10. juli fingu Anja Petersen og Páll Holm, Rituvík, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 3950 gr.

11. juli fingu Barbara S. Berg og Páll Nolsøe, Tórshavn, eina dóttur Hon var 54 cm. long og vigaði 4050 gr.

11. juli fingu Emly og Esmar Olsen, Hósvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3400 gr.

12. juli fingu Elkin og Niels Hansen, á Glyvrum, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3700 gr.

13. juli fingu Bjørg Schiller Jacobsen, Tórshavn og Jóannis Petersen, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3635 gr.



*8. juli fingu Noomi og Karl Gregersen, Syðrugøta, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4250 gr. Stóribeiggin eitur Salomon og lítlibeiggin eitur Ísak*



*9. juli fingu Elin Lorenzen og Nølli Linklett, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3950 gr.*

Elsa Martina Sakaguchi:

# Giftist við næmingi sínum úr Japan



*Elsa og Yuichi Sakaguchi fara eftir summarfrítíðina til Danmarkar at útbúgva seg meira, áðrenn tey fara aftur til Japan*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Síðst í august í fjør komu Elsa Martina Huusgaard (31ár) og Yuichi Sakaguchi (26 ár) úr Japan til Føroya at búgva eina tíð. Tey giftust í Filadelfia í Gøtu 22. oktober 2005, og eftir summarfrítíðina gongur leiðin til Danmarkar.

Elsa er fødd og uppvaksin í Syðrugøtu, dóttir Selmu Petersen og Anfinn Huusgaard úr Syðrugøtu.

Sum 16 ára gomul fór Elsa til Japan sum AFS-skiftisnæmingur. Hon kom at búgva hjá eini japanskari familju nakað norðanfyri Tokyo, í býnum Joetsu, har 190.000 fólk búgva. Har búði hon í eitt ár frá 1992-1993, har hon gekk í studentaskúla og fyri tað mesta hevði privattímar í japonskum og enskt og kreativar tímar.

Tað sum vakti mín serliga áhuga fyri Japan, var tá eg legði til merkis, at fólkið lítið og einki kendi til kristindómin. Tey vistu, at kristindómurin var eitt slag av mentan í vesturheiminum, men vistu als einki um sjálva kjarnuna í kristindóminum – evangeliið um Jesus. Tað var meðan eg búði har, at áhugin vaknaði fyri at fara til Japan at undirvísa í enskum og á tann hátt at virka sum trúboði har, sigur Elsa.

Elsa sigur, at enskt hevur als ikki verið undirvísingarevni í japanskum barnaskúlunum inntil fyri fáum árum síðan. Hesi seinastu árini er áhugin fyri enska málinum vaksin munandi ímillum Japanska fólkið, og í dag byrja børnini at læra enskt longu í fjórða flokki og flestu skúlar fáa vitjan av enskt-talandi útlendingum, sum undirvísa børnunum í nakrar tímar um mánaðin.

Í 1993 kom Elsa heim aftur og fór at ganga í studentaskúla við Gøtugjógv og á Kambsdali. Líðug við skúlan fór hon í 1995 til Motherwell í Skotlandi á bíbliuskúla hjá GLO og var liðug har í juni í 1996. Tá fór hon til Danmarkar at lesa japanskt á universitetinum í Aarhus. Í universitetshøpi kallast hesin lesturin japanologi. Elsa hevur lisið japanskt í fýra ár.

Elsa hevur eisini lisið eitt ár á einum universiteti í Kanagawa statinum, nær við Tokyo, og á venjingarskúlanum hjá Youth With a Mission (YWAM) í Tokyo.

Í september 2002 fór hon aftur til Japan og búsettist í býnum Osaka, sum liggur einar 600 km frá Tokyo, við suðurstrondina av Honshuoynni, sum er høvuðsoyggin í Japan.

Í Osaka, sum er næst størsti býur í Japan, búgva 2,6 milliónir fólk í miðbýarøkinum, og annars yvir 8 milliónir í Osaka-økinum. Býurin er týdningarmesti havnabýur í Japan við nógvum ídnaði. Umframt nógv bankavirksemi er Osaka eisini universitetsbýur. Í býnum eru eisini mong buddistik tempul. Religiónirnar shintuisman og buddhisman, hava stóran týdning í lívinum hjá japanarum. Hetta sæst m.a. aftur í teimum mongu heimatemplunum, sum flestu buddhistisk heim hava. Um ein í familjuni gerst kristin, hendir tað ikki so sjáldan, at viðkomandi verður stoyttur úr familjuni og verður ikki longur roknaður sum ein teirra.

Í Osaka arbeiddi Elsa í eini evangeliskari samkomu, sum kallast Takaishi Bible Church. Samkoman undirvísir japanarum í enskum og hesum arbeiði gjørdist Elsa ein partur av sum lærari. Arbeiðið er skipað sum ein verkætlanin, ið kallast Logos English Teaching Program. Høvuðsendamálið við hesi verkætlan er at náa lokalfólkið við evangeliinum, samstundis sum tey verða undirvíst í enskum.

Elsa sigur, at hon er ómetaliga glað fyri, at Gud uppfylti hennara trúboðaradreym við at gera seg til ein part av hesi spennandi verkætlan í Japan. Ein av næmingunum hjá Elsu var Yuichi Sakaguchi, sum hon í dag er gift við. Meðan tey hava búð í Føroyum, hevur Yuichi gingið á kvøldskúla og lært seg føroyskt, sum hann nú er rættuliga stinnur í.

Eftir summarfrítíðina fara Elsa og Yuichi Sakaguchi til Danmarkar at útbúgva seg meira.

## Prógv

Tann 7. juli tók Margretha Toftheyggj í Hvalba, prógv sum heilsurøktari á Esbjerg Sosial og Sundhedsskole.

30. juni hevur Hanne Maria Yri (Haahr) Signabøur, lokið prógv sum lækni á Københavns Universitet.

Durið Jacobsen, Fuglafjørður, fingið lærara útbúgvingina á Skive seminarium 23. juni.